# Námsfrøðingur søkist

Frítíðarskúlin “Kambur” søkir námsfrøðing at byrja 11. august 2008.

Eftir summarsteðgin fer frítíðarskúlin at økja um virksemi sítt, við at takað nøkur 6 ára gomul børn inn og veita teimum eitt serligt tilboð.

Vit fara tí at hava brúk fyri tær.

Vit sóknast einum námsfrøðingi, ið hevur dirvið at seta dagsskránna, bæði fyri tey 6 ára gomlu og frítíðarskúlabørnini. Vit vænta tí at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, ert ja-lig/ur, dugir at samstarva, tekur ábyrgd og dugir at seta tær mál.

Vit bjóða eitt spennandi starv, ið støðugt er í menning, har tú kanst verða við at mynda og seta tín dám á stovnin. “Kambur” liggur í einum náttúruríkum umhvørvið, har ið náttúran náttúrliga setur sín dám á gerandisdagin.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er 40 tímar um vikuna, við møguleikanum fyri niðursettari arbeiðstíð.

Starvið verður sett frá 11. august 2008.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Skrivlig umsókn skal verða Fuglafjarðar kommunu í hendi í seinasta lagi mikudagin 16. juli 2008 kl. 12.

Fuglafjarðar kommuna
Norður í Gerði 10b
FO-530 Fuglafjørður

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jógvan Philbrow, leiðari, telefon 73 77 91.

Runavíkar Kommuna

# DAGRØKTARAR til Runavíkar Kommunu

Runavíkar kommuna søkir eftir dagrøktarum til dagrøktarskipanina í Runavík at byrja eftir summarferiuna.

Í Dagrøktarskipanini eru 70 børn og 16 dagrøktarmammur

**Vit bjóða**
eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv, har tú fært hollan stuðul frá kommunalu skipanini.

Dagrøktarar hava tilknýti til Spælistovuna, sum m.a. fyriskipar felags tiltøk í Barnalonini og Ítróttarhøllini.

Í dagrøktini eru børn í aldrinum 0 – 5 ár.

**Vit ynskja at tú:**
- hevur góðar umstøður at ansa børnum inni og uttanfyri
- hevur umsorgan og hug at arbeiða við børnum
- ert virkin og hevur lætt við at samstarva
- hevur hug og áræði at skapa umstøður har børnini gleðast, trívast og mennast

**Setanarviðurskifti**
Dagrøktarar eru løntir eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til dagrøktarleiðaran á tlf. 44 85 94 ella 22 85 94

**Umsókn**
Skrivlig umsókn skal verða Dagrøktini í hendi í seinasta lagi 9. juli 2008.

**Dagrøktarskipanin í Runavíkar Kommunu**
Postsmoga 139 · 600 Saltangará

# LÆRARASTARV Í SUMBIAR SKÚLA

Lýst leyst til setanar frá 1. august 2008

Søkt verður eftir lærara til Sumbiar skúla umleið 20 tímar um vikuna.

Endaliga tímatalið verður ásett aftan á 1. september.

Starvið er tíðaravmarkað til skúlaárið 2008/09 vegna lærara í farloyvi.

**Tann sum sett/ur verður skal:**
- Undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans.
- Dugu at samstarva.
- Vera fús/ur at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum.
- Verða við til áhaldandi at menna skúlan.

**Førleika krøv:**
Læraraútbúgving. Ynskiligt er, at umsøkjarin kann undirvísa í m.a. ítrótti/svimjing og handarbeiði.

**Lønar og setanartreytir:**
Starvið verður lønt í lønarflokkinum 18.1-29.2.

Sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir:**
Umsóknir við avrit av prógvi,CV og møguligum viðmælum skulu verða skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi mánadagin 14. juli 2008 kl. 12.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær Arnfinn Bjarkhamar, skúlaleiðara, á tlf. 573875/ 373875.

**Sumbiar kommuna**
**FO-970 Sumba · Tel 370 344 · Fax 370 114**

## SKRÁSETING FØROYA
FELAGSSKRÁSETING

Box 264 · FO-110 Tórshavn · Tlf. +298 35 60 10
Fax +298 35 60 15 - E-mail skr@skraseting.fo

# LÝSING um skráseting av vinnurekandi virkjum

Vísandi til lóg um vinnurekandi virki nr. 1114 frá 20. september 2007, skulu virki umfataði av § 3 og § 4, fráboðast til skrásetingar hjá Skráseting Føroya innan 1. juli 2008, fyri at hava rættarføri.

Virki eftir § 3 eru virkir við avmarkaðari ábyrgd, har ongin av luttakarunum ábyrgjast persónliga, uttan avmarking og samhaldsfast. Hesi virki kallast virki við avmarkaðari ábyrgd – stytt v.v.a.á., ella feløg við avmarkaðari ábyrgd – stytt f.v.a.á. (á donskum v.m.b.a. og s.m.b.a.)

Sambært § 4 skulu eisini lutafeløg við avmarkaðari ábyrgd – stytt l.v.a.á. (á donskum a.m.b.a.) - vera skrásett hjá Skráseting Føroya.

Haraftrat eiga íognarfeløg - Í/f - og kommanditfeløg - K/F – har allir íognararnir, ávíkavist ábyrgaðir íognarar (komplementarar) eru partafeløg, smápartafeløg ella hava líknandi rættarform, sambært § 2 stk. 3 at vera skrásett.

SKRÁSETING FØROYA

# Kunngerð

Ognartøka av matr. nr. 402b, til vatnbrunn og vatnreinsiverk, í Kvívík.

Vísandi til §12 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954, um býarskipan og byggisamtyktir, hevur bygdaráðið á fundi 2. juni 2008 samtykt at ognartaka matr. nr. 402b, uml. 2905 $m^2$, til vatnbrunn og vatnreinsiverk.

Fráboðan um samtykt bygdaráðsins er latin hagastýrinum fyri Ognarhagan í Kvívík.

Ognartøkan liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 1. juli 2008 til og við 6. oktober 2008.

Møguligar kærur skulu verða Landsstýrinum/ Løgmálaráðnum í hendi í seinasta lagi 8. oktober 2008.

*Kvívík tann 26. juni 2008*

**Kvívíkar Kommuna**
**Víkavegur 4**
**FO-340 Kvívík**



# Hús í Klaksvík til sølu

Ognin Klaksvíksvegur 52 til sølu um hóskandi boð fæst.

| | |
|---|---|
| **Matr. nr.** | 385 |
| **Grundøki:** | 162 $m^2$ |
| **Húsini:** | ca. 6,30 x 7,56 m í trimum hæddum v/trimpli. |

Hetta eru timburhús á betonggrund og hava jarntak.

Húsini, sum liggja við høvuðsveg, eru í góðum standi, upprunaliga bygd í 1932, og renoveraði frá 1990-2000.

**Ábyrgd tlf. nr. 457791 & 222252**